# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Rodmundi í Sørvági til minnis

Langafríggjadag andaðist Rodmund Joensen, systkinnabarnið í Sørvági , bert 69 ára gamal.

Burturstaddur tá, fekk eg ikki fylgt honum, tískil henda seinasta heilsanin.

Rodmund hevði annars alt sítt lív góða heilsu, tó honum seinru árini bilti eitt og annað, sum hvørja ferð lagaði seg væl aftur, inntil hann nú, annars væl fyri, knappliga fór.

Rodmund var úr góðum bergi brotin. Pápin var Jóan Jakku hjá Tøðurasmussi, tiltikin fiskiklógv og skilamaður á sjógvi og landi. Hann førdi skip og róði í fleiri ár út í Grønlandi.

Mamman var Ella av Nystedættini við Norðskála og satt konubrot.

Einkarbeiggin er Esbern, giftur Jónvør. Hann var okkurt ár við til lands í Grønlandi, men fór annars maskinmeistaravegin, sigldi úti og er nú eftirløntur aftaná mong starvsár við Vága Floghavn.

Konfirmeraður fór Rodmund at rógva út við m.a. Jens hjá Víkarliassi, sum mann hava lært Rodmund eitt og annað á nærleiðum.

Haðani fór Rodmund at rógva út í Grønlandi, og bert 16 ára gamal læt hann byggja sína fyrstu Ellu til grønlandsútróður. Mær er sagt ,at hóast hann sjálvur átti og hevði betalt bátin, kundi hann vegna sín unga aldur ikki sjálvur standa fyri báti sínum til grønlandsútróður, men í hansara stað pápin.

Feðgarnir vóru í eini tvey ár bestir at fiska á sínum plássi og báturin helst ov lítil til fongin, og tískil lat Rodmund fá ár seinri byggja eitt so øgiligt ílat, ta næstu Elluna.

Tá so grønlandsútróðurin av fiskaloysi helt upp at, róðu so feðgarnir í fleiri ár út av Sørvági, og væl bar til.

Pápin fall vegna deyðiliga sjúku frá, men Rodmund helt áfram, ofta einsamallur á báti og skifti seinri bátin út við ein nútímans, trivaligan glastrevjabát við dekki í, og soleiðis helt hann í sínum lagi fram, til hann nú andaðist.

Gamaní gjørdust túrarnir seinru árini heldur styttri, eins og minni varð lagt fyri, men samanumtikið kom væl burturúr, tí Rodmund dugdi at laga seg eftir heilsu og orku og plægi at halda fyri: "Lat aðrar rokast og leggjast fyri", meðan hann sjálvur valdi at fara meira hóvliga fram við færri línum og tað styttri fiskidøgum hvørja ferð fyri í staðin at orka at flota dag um dag, og samanumtikið fekst upp á seg hjá honum væl burturúr.

Hann var sera virkin og røkin, fiskaði fyri tað nógva sjálvur sítt agn og røktaði sjálvur sínar línur, so sum mest fekst burturúr fonginum.

Tað var hugaligt at vitja og at koma á tal við Rodmund.

Hann var eldhugaður og hevði sínar egnu avgjørdu og ofta beisku meiningar um førdan fiskivinnupolitikk, tó hann helt ikki sørt av Heina í Kunoy.

Rodmund var til lít innløgumaður og familjukærur.

Hann hevði seyð og velti hvørt ár epli til fleiri húski, og tá eg stundum bað hann ikki leika soleiðis í á gamalsaldrinum, segði hann bara sum tað størstu sjálvfylgju, at hóast einsamallur í húsi, so hevði hann í nærmastu familju fleiri familjur at forsýna við fiski, fugli, kjøti og eplum.



Hóast sparin við sjálvan seg, so var hann sera umsorgsfullur, gávumildur persónur, og lat tá dálan rulla.

Tóku tey grind upp í Vágum og eg mungaði, ráddi Esbern mær bara at halda meg tætt upp at Rodmundi, tí so gjørdist eg neyvan sørur, og rætt fekk Esbern hvørja ferð.

Rodmund visti av, at mær dámdi at skera høvd, sum annars vóru vónleys at útvega sær í Havn.

Hann kundi tí ringja: "Eg havi skaffað tær nakrar kassar av spillfeskum bankhøvdum, so vilt tú hava, er bert at koma vestur eftir teimum, og ongantíð slapp eg at betala fyri meg.

Og einaferð vit sum familja vóru har vesturi at svala á børnunum, kom hann aftaná loknan útróðrardag við gylt av fiski at koyra í pottin. Tá bjóðaði hann sær eisini til at taka okkum nakað av havhesti, síðani tað fall honum so ómakaleyst, ímeðan hann larraði aftur at landi og samstundis kruvdi. Jú takk ,eitt kók av havhesti í bestu árstíð til slíkt, feitir og stapaleysir, hevði ikki verið so galið, men kvøldið eftir segði hann seg hava tikið mær einar tvey hundrað og skuldi við Esberni til hjálpar sjálvur byrja at royta.

Sjálvur gjørdist eg í so seinur, men komin í kjallaran vóru Rodmund og Esbern við at kryvja teir allar seinastu. Heimagjørda roytingarmaskinan við dýnuvørðinum um reyvina hevði gjørt skjótt av, og eg endaði aftur í Havn við øllum tvey hundrað havhestunum í pøkkum, klárum til boksina ella í pottin, uttan sjálvur at røra ein fingur. Soleiðis var Rodmund bara.

Tað, sum eg tó minnist mest Rodmund fyri vóru felags flógv minni frá barnaárum í Sørvági, har eg var at vera hjá skyldfólki hvørt summar.

Pisur høvdu vit nógvar. Gamla sagulagið í havanum var avtaglað við fuglabúrum við alskins pisum hjá okkum at matskaffa og passa.

Gerandislív okkara gekk tí fyri tað nógva við at fiska til hesar mongu pisur.

Frystiboksir vóru tá ongar, og tað mátti vera spill fekst, annars doyðu lundapisurnar av bróstmøði, meðan skurðar, ravnur, kráka og skarvsungin hjá Esbern ótu alt, sum rakst fyri nevið.

Og sikken eitt sirkus, tá vit mongu feriudreingir í evstu løtu, áðrenn skúlabyrjan aftur fóru leiðina heim til okkum sjálvs við bygdarbussi og strandfaraskipi fullum av fuglabúrum. Tað var tá av sonnum dreingjalív.

Kanska eru royndir á barnaárum at vara av og at vera góður við djór ein spíri til seinri menniskjuliga góðsku, ábyrgd og umsorgan. Hvør veit?

Rodmund legði eisini tíðliga á barnaárum til at fara út á Vág við báti at troyta hvítingamiðini.

Vit lántu tristin, skavaðu krakling undan bryggjuni, róðu út við býggjarlandinum, kastaðu og fingu mangan góðan fong. Tað var hugaligt og kendist sum mansevni í okkum.

Tá í fimtiárunum róðu nógvir vágamenn út í Grønlandi við bátum frá skonnartum, og vit smádreingir vildu í so máta fegnir teljast millum ordiligar menn.

Einaferð minnist eg eitt annað systkinnabarn, Árna hjá Juliufastir, hava vundið ein gamlan deksbát í gongd, og vit fóru líkir teimum vaksnu út á hvítingamiðini við smábátum afturút. Rodmund og eg fóru í tristin at kasta snøri, meðan Árni passaði »móðurskipið«, kyndi upp í kabyssuni og setti út á. Tað var ein serligur hugni, eisini at koma aftur at borði við fongi. Tað var akkurát sum ordiligt, og sum vit ímyndaðu okkum fedranna gerandislív á fjarskotnum leiðum ,og er tað neyvan av tilvild, at vit longu sum smádreingir dugdu at evna fiskireiðskap til, handfara slíkan og at venda okkum í báti.

Hóast Rodmund sjálvur ikki fekk konu og børn, var hann so sera góður við børn, og eg minnist ikki hvussu nógvum hann var gubbi at, men tey munnu vera nógv, síðani hann í familjuhøpi oftari var tiltalaður gubbi heldur enn Rodmund.

Rodmund var verandi gamal drongur, tó uttan fyri tað at vera serskøltur. Hann var fryntligur og sum yngri nógv uppi í kappróðri, dansaði og kvæð, og hóast hann sjálvur hvørki roykti ella drakk, var hann sum so als ikki fanatiskur viðv. øðrum fólkum, og fylti hann runt og væntaði gestir á gátt, varð Esbern sendur í rúsuna við stórum pengaseðlum. Har skuldi hjá honum sanniliga einki mangla.

Hann var framúr familjukærur, eins og hann sýndi okkum og okkara børnum ans til tað síðsta.

Og voru vit við børnunum har vesturi, skipaðu Rodmund og Esbern av sínum eintingum javnan fyri familjuáti og ikki minst útferðum við báti suður við Sørvágsbjørgunum og út í Tindhólm, har vit áttu so mong spor á barna- og unglingaárum, síðani abbin var uppisitari har, oftani var at fleyga ella reka seyð, og vit sluppu við.

Einaferð miðskeiðis í sjeytiárunum, og vit væl og virðiliga vóru komnir til manns, ringdi Rodmund meg upp ein sunnudag í Havn og bjóðaði mær við sær út í Tindhólm nakrar dagar at fleyga lunda.

Hann segði seg kláran at fara, og skuldi eg bara koma vestur, sum eg stóð.

Eg so gjørdi við mín bera kropp, og komin á bryggjuna í Sørvági, lá Ella longu klár at loysa við øllum neyðugum viðføri um borð.

Esbern skuldi seta okkum út í Tindhólm og koma eftir okkum aftur um fimm dagar.

Tað gekst væl, men ólukkutíð small klokkan í helluna har úti og í smildur. Radio var einki og fartelefonin tá ikki uppfunnin, so vit máttu bara miðja okkum eftir dagslýsi og myrkri, flúgvararutuni o.t.

Tað kendist forkunnugt í nakrar dagar at liva soleiðis so nær uppat óspiltari náttúru og fjart fra verðsins hentleikum og larmi.

Fyrsta morgunin fingu vit nakað av fugli, men so skifti ættin, og tað gjørdist vátt og beista hált í urðini.

Rodmund vildi av góðum grundum ikki vita av oljuklæðum í bjørgunum, so vit gjørdust skjótt í gjøgnum, og so var lítið annað at gera enn at fara aftur í smáttuna á hálvum degi og tørna inn til lundalýsnar at verma seg, ímeðan klæðini tornaðu aftur uppi yvir komfýrinum.

Maturin gekk eisini undan, tó ráð fingust fyri tí. Rodmund álaði skjótt fjaðrarnar av nøkrum fingnum lundum, ella eg fór við tráðuni oman á helluna. Eisini royndi eg í mínum føri at gera pannukøkur uttan egg ella ger, men tær vóru ikki mannaføði, og afturkomnir havnaði sjálvt hundurin mínar pannukøkur.

Hóast mátaligan fong høvdu vit saman nakrar sjálsamar og hugtakandi dagar í Tindhólmi, og Rodmundi og hansara fólki so vænt, mundi eg fáa bróðurpartin av veiðuni , grýtukláran við mær aftur til Havnar.

Heldur ikki fekk eg at hoyra fyri at hava brotið teimum allar stangararmarnar, íroknað eykasettið, vegna mítt klombruta fleygakynstur.

Ymiskt er, hvat í grundini bindur fólk saman, tó mær tykir dugni og felags góðar upplivingar í tøkum tíma og staði at vera eitt gott boð upp á tað.

Tí verður Rodmund saknaður og mintur av mær og mongum og ikki minst hansara allarnærmastu, sum hóast stakur vóru hansara familja, og sum hann í lívi og levnaði hevði so stóra umsorgan fyri.

**EyJo, systkinnabarnið**